# BÁRÐUR OG KULI GIRAFFURIN

TAÐ SKAL IKKI SÍGGJAST Í HANSARA BÓKUM AT HANN ER FØROYINGUR, SIGUR TEKNARIN OG HØVUNDURIN **BÁRÐUR OSKARSSON**, SUM EISINI AVDÚKAR, HVÍ **GIRAFFURIN** PÓL ER SO KUL

BARNABØKUR

Maria Eriksen Britt
á www.fortællingen.dk

**Eins og hinar bøkurnar hjá tær, snýr *Pól, hin kuli giraffurin* seg um djór. Hví hevur tú valt at tekna og skriva um djór í staðin fyri menniskju?**

– Tað er lættari við djórum. Um man brúkar menniskju, skal man býta tey upp í allar møguligar bólkar, og so verður tað knappliga politiskt ella rasistiskt ella alt møguligt annað. Man kann loyva sær nógv meir, tá man brúkar djórini sum útgangstøði.

– Hundurin gongur aftur í øllum mínum søgum, (uttan tí nýggjastu) tí hann er ein sera góð mynd av menniskjum, tá tey eru ringast. Og so fái eg eisini ymiskt forerandi í mínum arbeiði, tá eg brúki ein hund og seti hann inn í eina menniskjaliga støðu.



### Keði meg skjótt

**Hvussu arbeiðir tú, tá tú skalt gera eina nýggja bók?**

– Faktiskt tekni eg bara, og so koma hugskotini aftaná. Ella kanska sum frá líður. Bókina um giraffin Pól brúkti eg átta dagar um at tekna. Eg vildi gjarna gera eina bók, sum byrjaði við »Einaferð ...«, og so sat eg og teknaði saman við mínum børnum, og knappliga var Pól bara har. Við bókini *Ein hundur, ein ketta og ein mús*, teknaði eg stórt sæð allar tekningarnar, áðrenn eg byrjaði at arbeiða við sjálvari søguni. Eg manglaði bara eini tríggjar tekingar, tá eg byrjaði at arbeiða at restini.

– Mátin, eg arbeiði, hongur saman við, at eg skjótt byrji at keða meg. Tað skal ganga skjótt, ella tími eg ikki. Tí sær man eisini, at figurarnir broytast í mínum bókum. Um tú hyggur eftir Pól í byrjanini og endanum á søguni, so sært tú væl, at tekingarnar eru broyttar. Tá so ein figurur er komin har til, at hann er liðugur, so tími eg ikki at tekna hann meir. So er tað jú ikki longur ein avbjóðing.

### Gott tað endar galið

**Er eydnan at hava tað største kjøtbeinið?**

– Ja, um man er ein hundur. Ella um man er menniskja, tá tað er ringast. Men eg sigi ikki, hvat tað er, hundarnir umboða. Eg hugni mær við mínum bókum og haldi, at tað er upp til lesaran at tulka tær og gruna yvir, hvat slag av menniskjum búgva aftanfyri ymsu figurarnar.

**Tá man lesur *Ein hundur, ein ketta og ein mús* virkar tað næstan, sum at tú heldur, at vit oyðileggja kreativitetin og lívsgleðina hjá børnum við at vera so pedagogisk og friðarsøkjandi. Heldur tú tað?**

– Nei, tað haldi eg ikki. Eg haldi at kreativitetur og lívsgleði eru grundleggjandi kenslur, sum altíð fara at yvirliva, uttan mun til, hvat vit gera við okkara børn. Kreativiteturin er meir ein drívmegi enn eitt val.

– Men ein partur av poengginum er jú nettup, at uttan mun til, hvat vit gera ella hvat vit læra okkara børn, so endar tað galið á onkran máta fyrr ella seinni, og tað er gott! Tað gevur ein eyka spenning í gerandisdegnum. Og tí er ikki neyðugt hurta undir nakað, man skal bara minnast til at flenna eftir tí av og á.

### Bárður, giraffurin og Marlboro-maðurin

**Giraffurin Pól er kul, uttan at nakar ordiliga veit hví. Er tú eisini ein sovorðin, sum ert kul, uttan at vit vita hví?**

– HA! Tað veit eg ikki ... Men eg kundi gott hugsað mær at verið tað. Eg haldi, at tað er ein sovorðin Marlboro-Man dreymur, sum býr í okkum øllum. Hatta við at vera avslappað kul, uttan at royna at vera tað ...

– Og Pól er bara kul! Tað er nokk, tí hann er komin tað longri, enn allir aðrir giraffar. Hann torir at seta spurnartekin við, hvussu tingini eru, og hann hevur viljan at satsa. Og í ósigrinum hann upplivir, er eisini ein sigur.

**Droymir tú líka sum Pól um at eta okkurt forboðið?**

– Eg eti alt! Tað er nokk eisni tí, Pól gjarna vil eta okkurt annað. Man skal jú altíð royna. Eg haldi ikki, nakar nakrantíð hevur bjóðað mær nakað, sum eg ikki havi etið. Í grundini snýr tað seg um, at eg gjarna vil vita, hvat hendir. Hvat hendir, um ein giraffur ger av at eta kjøt? Eg royni veruliga at minnast tann øðrvísi mátan. Minnast at virðismeta tey skeivu tingini, sum henda.

### Djarvt føroyskt forlag

**Hvat er tað, sum tú vilt fortelja við tínum bókum?**

– Eg havi onga ávísa missión. Mær dámar best, tá tingini henda, meðan eg arbeiði. Annars blívir tað skjótt ov tilgjørt og keðiligt.

– Barnabøkur skulu tora at taka stór evni upp. Ikki bara tey álvarsomu og tungu, men øll evni og so bara fara eitt sindur longur. Seta fleiri spurningar. Seta meir uppá spæl. Eg skrivi ikki fyri at tekkjast nøkrum. Eg skrivi, tí myndabøkur skulu vera stuttligar.

– Sum foreldur keði eg meg ofta, tá eg lesi eina søgu fyri mínum børnum, og tað skal eg jú ikki! Góðar bøkur skulu gera nakað við bæði børn og vaksin, so tey hava okkurt at tosa um.

**Hvussu sæst tað í tínum bókum, at tú ert úr Føroyum?**

– Tað sæst faktiskt ikki. Eg havi í øllum førum gjørt mær ótrúliga stóran ómak fyri at tað ikki skal síggjast.

– Tað koma øgiliga nógvar myndabøkur út í Føroyum, og tær eru sera góðar og flottar. Men ofta kunnu tær vera truplar hjá øðrum at skilja, tí tey kenna ov lítið til Føroyar og mentanina har. Tað var ein av orsøkunum til, at eg fegin vildi gera eina bók, har tað tjóðarliga ikki trínir fram. Eg haldi heldur ikki, at mínar bøkur eru serliga danskar

– Um man sær nakað føroyskt í bókunum, so er tað nokk í tí nýskapandi og djarva. Tí lukkutíð er mítt forlag í Føroyum sera djarvt. Tey geva nógvar skeivar og øðrvísi bøkur út, og tað gevur nógvum rithøvundum dirvi til at skriva okkurt, sum ikki er líka sum alt annað. Og tað havi eg nokk tikið við mær.

**Hvørjar ætlanir hevur tú fyri framtíðina?**

– Eg arbeiði í løtuni við trimum bókum. Ella tvær av teimum eru faktiskt lidnar. Bókin um giraffin Pól var løtt at lesa og skilja og løtt at tosa um. Onnur av bókunum, sum nú liggja klárar, er eitt sindur torskildari, og tað dámar mær eisini væl. Og tvær av bókunum snúgva seg sjálvandi um hundar. Bæði um onkrar nýggjar og onkrar, sum man kanska hevur sæð fyrr ...

### Bøkur skulu upplivast

**Hvat eru góðar barnabókmentir?**

– Tær skulu vera ein uppliving! Tær kunnu gott vera logiskar og einfaldar, men máltónin og málið í myndunum ger allan munin. Í veruleikanum hevur søgugongdin onki at siga.

– At lesa eina bók skal vera ein hending, sum tolir at verða endurtikin. Og tað er sjálvandi tí, tað eisini er spennandi at skapa barnabøkur. Tær bestu barnabøkurnar verða skaptar, tá málið og myndirnar møtast og eitt triðja mál uppstendur, sum tosar til allar sansir.

*Týtt úr donskum: Anna V. Ellingsgaard*

### FAKTA **BÁRÐUR OSKARSSON**



**Aldur:** 37
**Starv:** Barnabókahøvundur og teknari.

Debuteraði í 2004 við bókini *Ein hundur, ein ketta og ein mús*, sum vann barna- og ungdómsbókavirðisløn útnorðurráðsins í 2006 umframt ein »White Raven« Special Mentinon frá Children's Digital Library.

Forløgini Bókadeild Føroya Lærarafelags og Torgarð hava givið út bøkurnar hjá Bárði Oskarsson á ávikavist føroyskum og donskum

**Bøkur:**

- *Ein hundur, ein ketta og ein mús*, 2004
- *Beinið*, 2007
- *Pól hin kuli giraffurin*, 2007